Avgerðin nærkast

Árliga simultankappingin hevur verið, og eisini er nú um at verða greitt, hvørji lið koma í finaluna í 1. deild

BRIDGE
Bogi Simonsen
og Arnbjørn Sivertsen

FM lið

i

Teir seinastu dystirnir í innleiðandi kappingini verða spældir í skúlanum í Runavík vikuskiftið 9-10. februar. Byrjað verður fríggjakvøldið kl. 19.00 og hildið verður fram leygarmorgunin kl. 11.00.

Nú bara trý umfør eru eftir at leika í innleiðandi kappingini er næstan greitt, hvørji fýra lið koma í finaluna. Liðið hjá Allan Dal-Christiansen (Allan, Jóannes Mouritsen, Per Kallsberg og Dánjal Pauli Mohr) hevur verið í einum flokki fyri seg. Føroyameistararnir frá í fjør, Farodane (Bogi Simonsen, Niels Nielsen, Hans Jacob Petersen og Arnbjørn Sivertsen) eru eftir eina laka byrjan komnir væl við aftur. Liðini hjá Carl Mikkelsen og Magna Jøkladal liggja eisini heilt væl fyri.

tø an ftir u før

1. Allan Dal-Christiansen	152
2. Farodane	128
3. Símin Lassaberg	121
4. Carl Mikkelsen	111
5. Gunnar Mouritsen	64
6. Oddmar Danielsen	38

Spælt verður soleiðis í Runavík:

r gg akvø i
Allan Dal-Christiansen
-Oddmar Danielsen
Símin Lassaberg-Farodane
Carl Mikkelsen
-Gunnar Mouritsen

ygar agin
Oddmar Danielsen
-Gunnar Mouritsen
Farodane-Carl Mikkelsen
Allan Dal-Christiansen
-Símin Lassaberg
Símin Lassaberg
-Oddmar Danielsen
Carl Mikkelsen
-Allan Dal-Christiansen
Gunnar Mouritsen
-Farodane

2. deild

Teir seinastu dystirnir í 2. deild verða eisini leiktir í skúlanum í Runavík 9. og 10. februar. Tey bæði liðini, sum enda fremst í 2.deild, skulu seinni í ein bólk saman við teimum báðum aftastu í 1. deild at spæla um tvey pláss í 1. deild komandi ár.

tø an og skr in
fyri i r n a

1. Jóna Grunnveit	232
2. Hanus Bærentsen	220
3. Eyðun Anthoniussen	174
4. Henny Egholm	147
5. Gullkonto	143
6. Danny Transport	139
7. Haldur Ellingsgaard	131
8. John Reid Skoralíð	111

r gg akvø i
Hanus Bærentsen-Gullkonto
Jóna Grunnveit-John Reid Skoralíð
Henny Egholm-Haldur Ellingsgaard
Eyðun Anthoniussen-Danny Transport

ygar agin
Henny Egholm-Hanus Bærentsen
Danny Transport-Haldur Ellingsgaard
Jóna Grunnveit-Gullkonto
John Reid Skoralíð-Eyðun Anthoniussen
Hanus Bærentsen-Jóna Grunnveit
Eyðun Anthoniussen-Gullkonto
Danny Transport-Henny Egholm
Haldur Ellingsgaard-John Reid Skoralíð

Føroya Bjór Simultan

Tað var í 1992, at Føroya Bjór Simultan kappingin varð leikt á fyrsta sinni, og hevur hon sostatt 10 ár á baki. Hetta hevur øll árini verið ein vælumtókt kapping, sum hevur megnað at savna ein hóp av spælarum. Styrkin við hesi kappingini er, at tað ber til at spæla á fleiri støðum samstundis, og fólk sleppa undan teirri nógvu ferðingini.

Í ár varð spælt í Suðuroy, Klaksvík, Fuglafirði og í Havn. Ætlanin var eisini at spæla í Vágum, men har noyddust teir at avlýsa í seinastu løtu. Tilsamans 39 pør spældu við í ár, og er hetta nakað minni enn tey bæði seinastu árini.

rs itini v ru si
tr t y fr stu
u uroy

1. Johan í Smiðjuni -Ingier Petersen	87
2. Andrias Djurhuus -Diaba Magnussen	86
3. Petur Gærdbo -Andrias Djurhuus	84

aksv k

1. Debes Christiansen - Kristin Joensen	98
2. Jens Jacobsen -Karl Isaksen	95
3. Jutta Heinesen -Edvin Toftegaard	90

ug af ør ur

1. Árant Berjastein -Dia Jacobsen	223
2. Magni Jøkladal -Pól Egholm	220
3. Hans Egil Joensen -Edmund Joensen	211

rs avn

1. Bogi Simonsen -Niels Nielsen	276
2. Reimund Langgaard -Carl Mikkelsen	273
3. Hans Jákup Petersen -Arnbjørn Sivertsen	267

a a rs it fyri an i

1. Jens Jacobsen -Karl Isaksen	615
2. Hans Egil Joensen -Edmund Joensen	577
3. Haldur Ellingsgaard -Kjartan Madsen	576
4. Reimund Langgaard -Carl Mikkelsen	574
5. Magni Jøkladal -Pól Egholm	574
6. Bogi Simonsen -Niels Nielsen	570
7. Debes Christiansen -Christen Joensen	550
8. Robert Langgaard -Eyðun Anthoniussen	545
9. Hans Jákup Petersen -Arnbjørn Sivertsen	541
10. Álvur Klakk -Jógvan Clementsen	527
11. Árant Berjastein -Dia Jacobsen	514
12. Oddmar Danielsen -Henriette Svenstrup	512
13. Bjørg Róin -Kristian Magnussen	510
14. Jens Pauli G. Nolsøe -Høgni Hansen	501
15. Rói á Rógvu -Allan Dal-Christians.	492
16. Hallur Ellingsgaard -Sólbjørn Klein	491
17. Johan í Smiðjuni -Ingier Petersen	486
18. Atli Hansen -Jógvan Ranghamar	486
19. Súsanna Dam -Súsanna Martinsdótt.	482
20. Hallberg Arnfríðsson -Heðin Mortensen	479
21. Gunna Midjord -Ásvør Djurhuus	468
22. Marita Krosstein -Jórun Højsteed	463
23. Jutta Heinesen -Edvin Toftegård	460
24. Odd Fjallsbak -Hans E. Fjallsbak	456
25. Knútur Nygaard -Áki Dimon	448
26. Jenis Tummasarson -Jallgrím Hilduberg	445
27. Ingibjørg Holm -John Reid Skoralíð	444
28. Eyðun Jensen -Øssur Winthereig	437
29. Sámal Just Dahl -Steinbjørn Jacobsen	427
30. Petur Gærdbo -Andrias Djurhuus	424
31. Andrias Djurhuus -Diaba Magnussen	417
32. Bibi Sigmundardóttir -Dávið Samuelsen	410
33. Ási Jacobsen -Páll Tummasarson	392
34. Mogens Højsteed -Jákup Klein	390
35. Andras Róin -Danny Danielsen	387
36. William Mortensen -Andre Dalfoss	376
37. Dia Poulsen -Mariann Eystberg	373
38. Leif Petersen -Hjalmar Joensen	334
39. Óla Jákup Olsen -Henny Petersen	327

Spenningurin millum luttakararnar var stórur, tá árliga Føroya-Bjór simultan kappingin varð hildin

Eitt spæl

V/- Norðan
Sp QT954
Hj K42
Rú K965
Kl 7

Vestan	Eystan
Sp A	Sp K76
Hj J975	Hj QT863
Rú QJT4	Rú A7
Kl T932	Kl 854

Sunnan
Sp J832
Hj A
Rú 832
Kl AKQJ6

V	N	E	S
Carl Mikkelsen	Hans J. Petersen	Reimund Langgaard	Arnbjørn Sivertsen
pass	pass	pass	1 kl
pass	1 sp	2 hj	3 sp
pass	4 sp	pass	pass

Útspæl: rú A

Spælið er frá Føroya Bjór Simultan kappingini.

Reimund spældi rú A út og síðan rú 7. Hann vónaði, at fáa makkarin inn at spæla rútara til trumfing.

Men soleiðis skuldi ikki ganga. Hans Jacob spældi kleyvara tríggjar ferðir og kastaði báðar rútararnar av hondini, áðrenn hann spældi trumf. Carl kom inn og spældi rútara, Hans Jacob trumfaði høgt, og mótspælið fekk bara 3 stikk.

Nógv pør komu í 4 sp á norðan hondini, og tey flestu vunnu kontraktina. Um rú A ikki verður tikið í útspælinum, verður kontraktin lættliga sett.

Steypakappingin

Drigið er um, hvussu spælast skal í steypakappingini. Vinnarin av hesari kappingini sleppur at umboða Føroyar í norðurlendsku kappingini fyri steypavinnarar, sum verður spæld í Rottneros, Svøríki 13.-15. mai.

utakasti fa so i is
Eyðuni Anthoniussen
-Róa á Rógvu Joensen
Marjun Restorff
-Oddmar Danielsen
Carl Mikkelsen-Farodane
Hallberg Arnfríðsson
-Danny Transport
Magni Jøkladal
-Allan Dal Christiansen

Kasparov reistist

Gary Kasparov vann sterku kappingina í Wijk aan Zee, og staðfesti harvið, at hann framhaldandi er millum teir allarbestu í heiminum

Eftir óvæntaða HM tapið til Kramnik í november, hevur Kasparov tó í Wijk aan Zee prógvað at hann framvegis kann kallast heimsins sterkasti telvari. Hálvt stig aftanfyri Kasparov kom Anand, sum hevði ein øgiligan endaspurt

TALV
Carl Eli Nolsøe Samuelsen

Sterkasta kapping nakrantíð er júst liðug telvað, og ikki heilt óvæntað vann Kasparov. Fimm vunnin talv og átta javnleikir og einki tap varð skoran hjá honum. Sera sannførandi.

Hetta varð triða árið á rað Kasparov vann í Wijk aan Zee, og hetta bragd hevur eingin megnað fyrr í hesari áralangu traditiónskapping. Í 1999 fekk Kasparov tíggju stig, í 2000 níggju og eitt hálvt og í ár níggju stig. Hesa stigarafturgongd nevndi Kasparov nærum í spølni á tíðindafundi eftir síðsta talv. Tó verður sigur hansara í ár mettur sum hansara besti. Kasparov segði á tíðindafundi at telvingin sum heild í kappingini var undir teirra veruliga støði. Alt ov nógvir smáfeilir kundi síggjast, eisini hjá honum sjálvum, men helt møguliga at tað ómetaliga trýstið sum var á hvørjum telvara ávirkaði telvingina.

Kasparov var undan síðsta umfarinum eitt stig fremstur, og varð javnleikur nóg mikið ímóti Adams. Kasparov hevði lítlan fyrimun tá teir samdust um javnleik. Hann vildi ivaleyst ikki taka nakran kjans.

Júst sum HM-dysturin ímóti Kramnik var av, lovaði Kasparov at í Wijk kom hann sterkt aftur, og hetta hann so sanniliga gjørdi.

Anand frammanfyri Kramnik

Eftir teimum fyrstu átta umførunum lá Shirov á odda, síðani tók Kasparov yvir við Shirov og Kramnik í hølunum. Eisini lógu Morozevich, Adams og Ivanchuk væl fyri. Men síðani kom vend í, Shirov fekk í seinastu fimm talvunum bert eitt stig, meðan Anand við eitt vaknaði. Undan teimum trimum seinastu talvunum hevði hann fingið nýggju javnleikir og bert eitt vunnið talv, men eitt reint hattrick ímóti endanum viðførdi at hann kom einsamallur næstur á mál. Anand og Kasparov vórðu teir einastu sum ikki taptu eitt talv.

Kramnik endaði trifremstur saman við Ivanchuk. Eitt hampilig úrslit hjá Kramnik, sum tó ikki kann vera heit nøgdur. Hann tapti bert tað eina talvið ímóti Morozevich. Ein serlig hending í kappingini varð í 11. umfari, tá Kramnik í rættum ítróttaranda tók javnt við hvíta fólkinum, í hesum rættiliga avgerandi talvi, eftir heilt fáir leikir ímóti einum sjúkum Leko.

Ivanchuk hevði eina framúr góða kapping við sínum deilda triðjaplássi.

Á fimta plássi komu Adams, Morozevich og Shirov, meðan Leko skuffaði við bert 50% skoru og einum áttinda plássi. Topalov hevði somuleiðis eina heldur ringa kapping.

Hinir, Fedorov, van Wely, Piket, Tiviakov og Timman endaðu ikki óvæntað í botninum. Timman fekk annars góða byrjan, men tapti útlúgvaður fýra seinastu talvini.

Endaliga støðan sæst aðrastaðni á síðuni.

Í B-bólkinum ognaði 13 ára gamli Radjabov sær sín annað GM norm, og manglar hann nú bert tann triða fyri at kunna kalla seg stórmeistara. Hann endaði nummar tvey aftanfyri Gurevich.

Næsta kapping hjá Kasparov verður í Linares, Spania, frá 22. februar-7. mars, har hann saman við Shirov, Leko, Judit Polgar, Karpov og Grischuk telva dupultumfør, tvær reisir ímóti hvørjum øðrum. Serliga tvey nøvn eru áhugaverd, nevnliga gamla kjempan Karpov, sum ikki hevur telvað nógv seinastu árini, og Grischuk sum nú fær sínar royndir ímóti tveimum fyrrverandi heimsmeistarum. Sera áhugaverd kapping.

Annar kenningur, Ruslan Ponomariov og superveteranurin Viktor Korchnoi leiktu herfyri 4-4 í einum dysti í Ukraina. Hetta má metast sum eitt gott úrslit hjá skjótt 70 ára gamla Korchnoi, eftirsum Ponomariov nærkast 2700 í rating.

John Arni í hálvfinaluna í KM

John Arni Nilssen tapti sunnudagin hálvfinaluna í kappingini um at finna meistaran í Keypmannahavn. Fjórðingsfinaluna vann hann í umdysti ímóti Torbjørn Rosenlund, men koppaði ikki IM Bjørn Brinck Claussen. John Arni vann fyrsta talv, men tapti seinna talvið, har hann annars hevði kvalitet meira. Í kviktalvsumdystinum tapti hann 1,5-0,5.

Í finaluni hittir Bjørn Brinck Claussen tí unga Henrik El-Kher.

Stórt barnatiltak í Havnar Telvingarfelag

Havnar Telvingarfelag og Talvsamband Føroya skipaðu sunnudagin fyri FM-liðkapping fyri børn upp til 16 ár. Tiltakið eydnaðist sera væl, og heili 56 børn luttóku, harav átta gentur, fýra frá Kollafirði og fýra frá Havn. Fimm feløg vóru umboðað.

Havnin mannaðu fleiri lið, har Havnin 1 vann kappingina við 36,5 stigum. Olaf Berg, Jákup D. Joensen, Mortan Thomsen, Rógvi Mortensen, Bjørgvin Lenvig og Pætur Johannesen mannaðu vinnandi havnarliðið. Klaksvík 1 bleiv nummar tvey og Gøta 1 endaðu á flottum triðja plássi.

Úr Gøtu komu tvey sterk dreingjalið, og tað er stuttligt at síggja at eisini teir kunna. Eisini var toftaliðið væl við.

Eingin dreingjadeild er umboðað í liðkappingini, og tískil varð hetta tiltak roynt. Næsta barnatalvkapping verður í Klaksvík 18. februar. Fýra tey fremstu liðini tilsamans eftir hesum báðum kappingum telva finalukapping í Hósvík samstundis sum síðsta umfar í liðkappingini verður, tá øll liðini telva undir somu lon.

Útsetti dysturin í 2. deild millum Toftir og Klaksvík, bleiv leiktur um vikuskifti, og toftamenn, við Jens Kristian Hansen aftur á fyrsta borði, vunnu stórsigur 3,5-0,5. Sigurin førkaðu teir til upp til annað pláss aftanfyri Havnina.

Nýggj ratað talvkapping byrjar hósdagin 1. februar í hølum Havnar Telvingarfelags. Níggju umfør verða telvað til og við 24. mars, og er hetta avgjørt ein ein góð venjing undan FM á páskum sum verður í Vestmanna.

		N	ELO	1	2	3	4	5	6	7	8	9	10	11	12	13	14	P
1.	Kasparov	Rus	2849	X	_	_	_	_	_	1	_	1	1	_	_	1	1	9
2.	Anand	Ind	2790	_	X	_	_	_	_	_	_	_	_	1	1	1	1	8,5
3.	Ivanchuck	Ukr	2717	_	_	X	0	_	1	1	_	_	1	_	_	_	1	8
4.	Kramnik	Rus	2772	_	_	1	X	_	0	1	_	_	_	1	_	1	_	8
5.	Adams	Eng	2746	_	_	_	_	X	1	_	_	_	0	1	_	1	_	7,5
6.	Morozevich	Rus	2745	_	_	0	1	0	X	_	0	_	1	1	1	1	_	7,5
7.	Shirov	Spa	2718	0	_	0	0	_	_	X	_	1	_	1	1	1	1	7,5
8.	Leko	Hun	2745	_	_	_	_	_	1	_	X	_	_	0	_	_	_	6,5
9.	Topalov	Bul	2718	0	_	_	_	_	_	0	_	X	_	_	1	_	0	5,5
10.	Fedorov	Blr	2575	0	_	0	_	1	0	_	_	_	X	_	0	0	1	5
11.	Van Wely	Ned	2700	_	0	_	0	0	0	0	1	_	_	X	1	_	_	5
12.	Piket	Ned	2632	_	0	_	_	_	0	0	_	0	1	0	X	_	_	4,5
13.	Tiviakov	Ned	2597	0	0	_	0	0	0	0	_	_	1	_	_	X	1	4,5
14.	Timman	Ned	2629	0	0	0	_	_	_	0	_	1	0	_	_	0	X	4

Talvið hesa vikuna

Anand,V (2790) - Van Wely,L (2700)
Corus Wijk aan Zee NED (13), 28.01.2001

1.e4 c5 2.Nf3 d6 3.d4 cxd4 4.Nxd4 Nf6 5.Nc3 a6 6.Be3 e5 7.Nb3 Be6 8.Qd2 Be7 9.f3 0-0 10.0-0-0!? (eitt frábrigd í sisilianskari byrjanini, ið verður mett gott hjá hvítum) Qc7 11.g4 Rc8 12.Kb1 Nbd7 13.Qf2 b5 14.g5 Nh5 15.h4 b4 16.Nd5 (Anand letur van Wely leypa á við finnum sínum, hann hevur nevnliga sína egnu plan við sentrum) Bxd5 17.Rxd5 a5 18.Bh3 a4 19.Nc1 Rcb8 20.Bg4 Nf4 21.Bxf4 exf4 22.Bxd7 Qxd7 23.Qd2 Rb5

24.Ne2 Rc8 25.Nxf4 b3 26.cxb3 (sera kalt av Anand) axb3 27.a3 Rc2 (sær gott út, men er als ikki hættisligt fyri Anand) 28.Qd3 Rb8 29.Rd4 Bf8 30.Nd5 (Anand styrkir enn meir um sentrum, og er hetta avgerandi) Rf2 (panikkur) 31.Qe3 Rg2 32.Rd2 Rg3 33.Qf2 Rh3 34.Rhd1! (svartur kann ikki verja seg ímóti Rif4, sum fangar svarta rókin. Hollendarin gavst tí) 1-0